## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul millum útnyrðing og útsynning og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og regn ella ælingur av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, týsdagin snarar hann í eystan. Mánadagin ælingur, men týsdagin regn. Hitin millum 8 og 12 stig.




# Seyðarhøvd selir føroyskan tónleik

**Eitt selofaninnpakkað seyðarhøvd skal selja atgongumerki til konsertina í Vega í Keypmannahavn 27. august**

TÓNLEIKKUR

Fyrireikararnir av Atlantic Music Event brúka eina mynd av einum seyðarhøvdi, sum amboð at selja atgongumerki til konsertina í Vega leygarkvøldið 27. august.

Myndin er sterk og óvanliga flott, og so er hon 100% føroysk, ella skuldi man kanska sagt 200% føroysk.

Tað eru menninirnir, sum fingu AME virðisløn fyri vakrasta fløguhúsa fyrr í ár, Niels Arge Galán og Uni Árting, sum hava gjørt plakatina, sum uttan iva fer at fanga mangt eyga í gøtunum í Keypmannahavn komandi vikuna.

Teir hava gjørt eitt prísskelti við øllum teimum viðkomandi upplýsingunum, og hava klistrað tað á eitt selofoninnpakkað seyðarhøvd og tikið eina mynd av hesum. Henda mynd síðani prenta sum plakat.

*nud*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -17 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 24 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 29 |
| Malta | -- |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 29 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. við Ísland fer spakuliga í landsynning og grynnist. Ódnin "IRENE" á 40N-52V fer móti Hvarvinum og dýpist nógv.




**Í dag:**
Stormlágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer spakuliga eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/8 kl. 06[00]– 18/8. 06[00]. Hitin í gjár: 12,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/8 kl. 06[00]– 18/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 46,6 mm

## Morgunlestrar
**22.-27. august**

*Emil Olsen, prestur, lesur*

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 22. august:**
nr. 374 Um synd og skomm teg hava sprongt
Luk. 7,37
nr. 337 Guð havi lov, tí Harrans orð

**Týsdagin 23. august:**
nr. 518 Teg vil elska, tú mín styrki
Sálm. 145,9
nr. 468 Frelsari hevði ikki eg teg funnið

**Mikudagin 24. august:**
nr. 484 Hvør við á meg klaga
Luk. 15, 1 og 2
nr. 21 Algóði faðir, tú yndismilt bendir

**Hósdagin 25. august:**
nr. 146 Gott sáð, ið út var sáað
Luk. 8,5
nr. 332 Títt er, Guð, várt arvagóðs

**Fríggjadagin 26. august:**
nr. 520 Sólin hevur sama lag
Luk. 14, 1-4
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær

**Leygardagin 27. august:**
nr. 155 Fyrst boðar Guð sítt sæla náðarorðið

## VESTFALLSKYRRINDI

13. august Fyrra kvarter
19. august Fullmáni/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. aug | 06.54 | 19.22 | 05.54 | 18.22 | 06.09 | 18.37 | 08.54 | 21.22 | 09.54 | 22.22 | 05.09 | 17.37 | 04.09 | 16.37 | 07.09 | 19.37 | 08.09 | 20.37 | 06.39 | 19.07 | 07.54 | 20.22 |
| 20. aug | 07.50 | 20.15 | 06.50 | 19.15 | 07.05 | 19.30 | 09.50 | 22.15 | 10.50 | 23.15 | 06.05 | 18.30 | 05.05 | 17.30 | 08.05 | 20.30 | 09.05 | 21.30 | 07.35 | 20.00 | 08.50 | 21.15 |
| 21. aug | 08.41 | 21.05 | 07.41 | 20.05 | 07.56 | 20.20 | 10.41 | 23.05 | 11.41 | - | 06.56 | 19.20 | 05.56 | 18.20 | 08.56 | 21.20 | 09.56 | 22.20 | 08.26 | 20.50 | 09.41 | 22.05 |
| 22. aug | 09.29 | 21.52 | 08.29 | 20.52 | 08.44 | 21.07 | 11.29 | 23.52 | 00.05 | 12.29 | 07.44 | 20.07 | 06.44 | 19.07 | 09.44 | 22.07 | 10.44 | 23.07 | 09.14 | 21.37 | 10.29 | 22.52 |
| 23. aug | 10.15 | 22.38 | 09.15 | 21.38 | 09.30 | 21.53 | - | 12.15 | 00.52 | 13.15 | 08.30 | 20.53 | 07.30 | 19.53 | 10.30 | 22.53 | 11.30 | 23.53 | 10.00 | 22.23 | 11.15 | 23.38 |

5 707265 100050 >